# **Rokoko** hevur klæðir til øll

**Rokoko í Norðagøtu er kendur klædnahandil, ið hevur 21 ára á baki**

**HANDIL**

Kendi klædnahandilin Rokoko hevur klæðir til øll, bæði yngri og eldri, tey smáu, til ommur og abbar, menn og kvinnur.

Kendi handilin hevur 21 ár á baki. Hann lá fyrst í Syðrugøtu, men hevur nú verið í Norðagøtu eina rúma tíð.

Handilin liggur væl fyri og nógv fólk koma framvið.

## Galla

Umframt klæðir til alla familjuna, so hevur Rokoko seinnu árini havt gallakjólar. Veitslukjólarnir eru nógv nýttir fyri tíðina, og gallaveitslurnar eru fleiri, og í Rokoko hava tey holla vitan hesum viðvíkjandi.

## Kend merkir

Éisini fáast stórar støddir til kvinnur í Rokoko, støddir úr 42 til 56, og nevnast kunnu her merkir sum DNY og Zhenzi.

Til børnini kunnu nevnast merkir sum ClaireKids, Kids og Deksel.

Rokoko hevur annars hóp av kendum merkivørum, so sum Shine, CC, 2biz og mong, mong onnur.

## Navia

Í Rokoko hava tey eisini fingið Navia tógv, og í næstum fáa tey eisini Navia troyggjur. So sum nakað nýtt, fáast nú væl umtóktu Navia vørurnar í Norðagøtu hjá Rokoko.

## Summarmótin

Í Rokoko siga tey, at summarmótin er t.d. tunikur og gamasjubrøkur. Um litirnar kann sigast, at tað litríka er "inn", so sum lilla og grønt og eisini hvítt.






**Kendi klædnahandilin Rokoko hevur klæðir til øll, bæði yngri og eldri, tey smáu, til ommur og abbar, menn og kvinnur**











